# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




# Shell skiftir til Magn




*Shellstøðin á Frælsinum, sum varð bygd í 1970, er tann fyrsta sum skiftir frá Shell til Magn*

**Nú hvørvur skelin á búmerkinum hjá oljufelagnum, sum nú skiftir frá Føroya Shell til Magn**

Føroya Shell skiftir í hesum døgum samleika og øll skelti og búmerki, og pumpur verða nú reyð og grøn ístaðin fyri reytt, hvítt og gult, sum hevur verið liturin hjá Shell. Støðin á Frælsinum er tann fyrsta, sum skiftir til Magn.

Magn merkir orka og felagið verður í framtíðini bæði oljufelag og orkuveitari.

Eftir 1. apríl hvørvur navnið Shell av føroyska marknaðinum. Shell hevur verið umboðað í Føroyum síðan 1925.

mg

# Handtøk við hita

Tað er ofta kalt at koyra motorsúkklu, serliga her hjá okkum. Men tað eru ráð fyri tí. HotGrips handtøkini við hita og hitaregulering eru sera framkomin og eru ein góð íløga, bæði fyri at fyri at halda vetrarkuldanum úti og eisini um summarið kann tað vera kalt at koyra.

HotGrips skipanin hevur automatiskan termostat, og syrgir fyri at hitin altíð er tann rætti.

HotGrips handtøkini passa til so gott sum allar motorsúkklur og eru sera løtt at montera, tey brúka heldur ikki nógvan streym frá battaríinum á motorsúkkluni, bert upp til fýra amper.

HotGrips kann keypast hjá MC-Søluni í Slættanesgøtu í Havn.



*Tað kann vera kalt at koyra motorsúkklu*



*HotGrips skipanin hevur automatiskan termostat*



*HotGrips handtøkini passa til so gott sum allar motorsúkklur*